# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



*Deborah Gellatly býr í Lismore i Australia. Her er hon umborð á starndfaraskipinum Teistanum*

*Mynd: Sámal Bláhamar*

Deborah Gellatly:

## Til Føroya at svala av

Tað eru ikki tey nógvu ferðafólkini, sum ferðast hendan vegin á hávetri, men tað eru tó tey sum flýggja úr heitum londum hinumegin jarðarknøttin til okkara heimspart.

Ein teirra er Deborah Gellatly, sum býr í Lismore i Australia, har hon hevur skrivstovustarv. Hon er av skotskari ætt og hevur áhuga fyri Evropa og Norðurlondum.

Hóast tað er hásummar í heimlandinum í løtuni, valdi hon at gera ein túr til Norðuratlantisku londini Norra, Ísland, Føroyar og Skotland.

Deborah sigur, at við millum 35 og 40 hilatstigum er tað í so heitt hjá sær um summarið, tí er tað gott at koma hendanvegin at svala av og síggja hvussu fólk hinumegin jarðarknøttin hava tað.

Hon hevur ferðast kring landið og er komin í prát við nógv fólk her. Mikudagin var hon í Sandoynni og vitjaði fleiri av smáu bygdunum har. Hon vitjaði m.a. skúlan í Dali og fekk eitt gott prát við læraran og børnini.

Deborah sigur, at hon hevur virkuliga nýtt at verið í Føroyum - bæði fólkini og náttúruna. Hon heldur at fólkini í Føroyum eru sera vinarlig og virka so avslappaði, eini tey sum búgva í høvuðsstaðnum.

Hon er sannførd um at Norðurlondini eru eitt upplagt ferðamál hjá australiarum, serliga fyri at sleppa úr ógvusliga hitanum eina løtu.

Deborah Gellatly vitjar í Føroyum eina viku og fer av landinum aftur leygardagin, tá hon fer til Skotlands.

**mg**

---

Fyri 10 árum síðan:

## Janus heiðraður í 1999

**Sosialurin 22. januar 1999**

Fyri 10 árum síðan, 22. januar 1999, skrivaði Sosialurin um Janus Kamban, listamann, sum varð heiðraður. Tað var Signar á Brúnni, landsstýrismaður í mentamálum, sum handaði honum heiðursgávuna.

Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, sigur at ein góður árgangur av toski er á veg.

Bygdaráðsmenninir í fimm kommunur í Eysturoy ynskja at øll oyggin verður ein kommuna.

Á baksíðuni er grein um at Føroya Rættur avhoyrdi 11 vitni í málinum um eldáseting í Marco Polo og Skáanum.



sosialur

Altern

til full

# Andlát og jarðarferðir

**Julie Joensen á Sandi** andaðist á Landssjúkrahúsinum mánakvøldið, 86 ára gomul. Kistan fer úr kappellinum hósdagin klokkan 14.30. Jarðarferðin verður úr Sands kirkju fríggjadagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

**Olaf Hentze Rasmussen**, búsitandi í Keypmannahavn, ættaður úr Sandavági, andaðist á Drossebo Plejehjem týsdagin, 99 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Jegersborgs Kirke fríggjadagin kl. 12.

**Ian Onghamar** andaðist á Gentofte Hospital 20. januar, 50 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at

**Rigmor Elisabeth Thomsen**
fyrrv. heilsusjúkrasystir, Norðragøta

andaðist í Slagelse sunnudagin 18. januar,
86 ára gomul.
Kistan kemur í Vágar hósdagin kl. 14.45.
Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju
leygardagin kl. 13.00.

**Familjan**

Tey, ið vilja minnast Rigmor, kunnu lata Gøtu kirkju eina gávu.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at góða mamma okkara, vermamma , omma og langomma

**Petrina Jensen**
(vanliga nevnd Gigga)
úr Kvívík

andaðist í heiminum týsdagin 20. januar,
90 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju
leygardagin kl. 13.00 .
Sungið verður úr sálmabókini.

*Fyri tey avvarðandi*
***Jógvan og Kristjan***

Tey, ið vilja minnast Giggu, kunnu lata Kvívíkar kirkju eina peningagávu.

---

**Dagurin**
**22. januar. Vincentius**, deyður umleið ár 300 í Zaragoza. Píndur til deyða undir Diocletianus keisara. Navnið er lanínskt og merkir hin sigursæli.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*